# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bilradio á Rás2

*Sendingin Bilradio verður send hósdagin 27. august kl. 16.05 og endursend leygardagin kl. 13.*




*Vagnur Johannesen og Ragnar Joensen, stjórar hjá FTZ í Føroyum*

# Fakmessa og vørumessa

**Fríggjadagin 28. august skipar FTZ-Billutir & Amboð í Fútalág í Havn fyri fakmessu og leygardagin verður opið fyri almenninginum til eina framsýning við øllum til bilin, siga Vagnur Johannesen og Ragnar Joensen, stjórar hjá FTZ í Føroyum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Síðan danska fyritøkan FTZ Autodele & Værktøj A/S í fjør keypti meirilutan Sp/f AMA í Havn og eykalutadeildini hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali eru nógvar broytingar og tillagingar gjørdar.

Nú er komið so langt at vit kunnu bjóða bilbransjuni til eina fakmessu og almenninginum til eina framsýning við okkara stóra vøruúrvali av øllum til bilin, siga Vagnur Johannesen og Ragnar Joensen, stjórar hjá FTZ í Føroyum.

Fríggjadagin verður ein fakmessa fyri innboðin. Har umframt føroysku starvsfólkini hjá FTZ eisini vera umboð frá Bosch-prøveteknik, Ctek ladere, ZF trading, SKF, Triscan og frá FTZ Danmark. Eisini verða umboð fyri høvuðsleiðsluna í FTZ og Nordic Forum.

Leygardagin verður opið fyri almenninginum til eina framsýning við øllum tí nýggjasta sum FTZ hevur at bjóða til bilin. Vit hava eitt stórt úrval av øllum til viðlíkahald av bilum, umframt barnastólar og aðra útgerð. Øll eru vælkomin leygardagin, siga Vagnur Johannesen og Ragnar Joensen, stjórar hjá FTZ í Føroyum.

FTZ Autodele & Værktøj A/S er størsta heilsølufyritøkan í Danmark innan eykalutir og amboð til bilar. Fyritøkan hevur yvir 40 deildir í Danmark við meira enn 750 starvsfólkum. Árligi umsetningurin er yvir eina milliard krónur.

# Prestar til at halda frástøðu

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Landsverk hevur nú í eina tíð havt eina royndarverkætlan á landsvegnum Millum Fjarða, sum skal tryggja, at bilførarar halda lógarásettu frástøðuna til bilin frammanfyri. Á heimasíðuni koyrilararin.fo skrivar Benny Ejdesgaard, koyrilærari, at ein bílig og betri loysn hevði verið at nýtt teir sonevndu "prestarnar", sum standa fram við øllum landsvegunum kring landið til endamálið.

Benny mælir til at triði hvør prestur verður frámerktur meira sjónligur, so hann sæst betur enn hinir. Teir kunnu nýtast í staðin fyri pílarnar, sum verða málaðir á vegbreytina.

Fyrimunir við at nýta prestarnar er t.d. at teir vera standandi í øllum veðri, at teir ikki skulu viðlíkahaldast eins nógv og pílarnir, at teir lýsa í myrkri, at teir standa fram við øllum landsvegunum at tríggir prestar hava á leið somu fjarstøðu sum pílarnir. Við øðrum orðum eru "avstandsprestarnir" nógv meira sjónligir enn pílarnir, skrivar Benny Ejdesgaard.



*Mynd: Benny Ejdesgaard*